# Ein køkur sum eingin annar

**- Vit hildu, at køkurin var vorðin heldur slitin og mátti skiftast út við ein nýggjan ella málast. Knappliga ein dagin kom tað til mín: - Hví ikki brúka tilfarið, sum eg brúkti til mínar málningar, til at prýða mín egna køk?, sigur Eli Smith. Í dag hevur hann ein av teimum meiri sjáldsomu køkunum í Føroyum**

*»Onkur hevur heitt á meg um at taka patent uppá tað. Tja, eg veit ikki. Eg trúgvi neyvan at nakar fer at gera tað, tí hetta er sera strævið at fáa tað at bera seg fíggjarliga og krevur drúgvar royndir«*

*»Tað er ikki í hvørjum køki, at borðplátan er klædd við koli úr Hvalba, karmarnir í vindeygunum við sandi úr Søltuvík, og skápshurðar og skuffur við royðugróti av Argjum, úr Múla og av Velbastað og jákupsskeljum av Oyri«*

**Børkugøta:** - Ja, at køkurin er blivin soleiðis, sum hann er tað í dag, byrjaði í roynd og veru við einum óhappi umborð á bátinum, - tá motorurin ikki vildi starta aftur, sigur Eli við einum stórum brosi.

Kemur tú inn í hugnaliga køkinum í heiminum hjá honum og familjuni í Børkugøtu, verður ein beinanvegin bergtikin av orginalitetinum og samansetingini av litunum.

Eingin annar køkur er sum hesin: Skápshurðarnar hava ymiskan lit, skuffurnar og borðplátan tað sama. Munurin á hesum køkinum og øllum hinum køkunum er, at hetta er alt klætt við litum, ið Eli hevur funnið í tí føroysku náttúruni.

Tað er ikki í hvørjum køki, at borðplátan er klædd við koli úr Hvalba, karmarnir í vindeygunum við sandi úr Søltuvík, og skápshurðar og skuffur við royðugróti av Argjum, úr Múla og av Velbastað og við jákupsskeljum av Oyri.

- Onkur hevur heitt á meg um at taka patent uppá tað. Tja, eg veit ikki. Eg trúgvi neyvan, at nakar fer at gera tað, tí hetta er sera strævið og krevur drúgvar royndir.

- Tá ein arbeiðir við hesum, er tað ein langur vegur, áðrenn ein sær nøkur úrslit, slær hann fast.

### Ikki so einfalt

Uppskot hansara um at prýða køkin, heldur enn at skifta hann út við ein spildurnýggjan, vann frama heima við hús. So var bert eftir at fara til verka.

Byrjað varð í tí smáa í september mánaði í 2006. Hann tók ta fyrstu skápshurðina við sær niður í kjallaran, og klæddi hana við sandi og lakeraði hana. Tað tók sína tíð at finna rætta lakkið, tí nógvar royndir miseydnaðust.

- Tað tók mær eisini mánaðir at gera køkin, tí eg arbeiddi ikki allatíðina við hesum. Síðani fór eg í holt við hinar hurðarnar, karmarnar, borðplátuna og veggin.

- Konan og døttirin strongdu á meg, so eg mátti skunda mær at fáa alt liðugt, tí køkurin stóð í hálvum gekki, og døtturin hevði føðingardag í februar. Men hann bleiv eisini liðugur áðrenn. Og stoltur var eg, sigur Eli, og leggur síðani aftrat: - Sjálvur haldi eg, at úrslitið er gott, og tað heldur mín elskaða kona eisini!

Hann er útlærdur sum radiomekanikari og hevur verið til skips, men við aldaskiftið slepti hann øllum hesum, og hevur síðani halgað seg listarligum arbeiði: Fyrst við pensli í hond. Nú við nýggju listagrein síni, grótmáling.

### Tann vakra lindin

Alt hevur sjálvandi sína forsøgu, og tað hevur serstaki køkurin í heimi hansara sum vera man eisini.

Henda forsøgan byrjaði á sumri 2003 út fyri Hósmøl í Nólsoy. Her finst ein hópur av gróti, mest malargrót. Men vakna eygað hjá listarmanninum fangaði eisini annað enn malargrótið: Royðugrótið.

Hann var farin við donskum gestum at skoða Nólsoynna frá sjónum. Setti gestirnar av á Borðuni og síðani skuldu hann møta teimum aftur í bygdini. Ávegis til bygdina steðgaði hann á út fyri hesi mølini, har ein týðiliga sær ta reydligu royðulindina millum basaltfláirnar.

Eli var bergtikin av hesi sjón og hugsaði við sær sjálvum, at hetta royðugrótið kundi verði nýtt til at gera máling burturúr.

- Eg hevði als ikki ætlað mær í land henda dagin. Men tá motorurin ikki startaði aftur, var ikki annað at gera enn at rógva í land og fáa fatur á fólki umvegis fartelefonina, greiðir hann frá.

Nakað eftir kom hjálpin fram, og báturin og Eli vórðu sleipaðir aftur inn á Havnina.

### Hermaður í Eldførinum

Løtuna her á Hósmøl brúkti hann til fulnar, eins og ein annar Robinson Crusoe, sum fór rannsóknarferð á síni oyggj.

- Tú, eg skal siga sum er, at eg varð fyltur við slíkari vælveru, meðan eg stóð her einsamallur í kvirruni og við øllum vakurleikanum rundan um, at eg mátti bara takka Gudi fyri hesa veldigu upplivingina, greiðir Eli frá.

Tær fyrstu royndirnar av royðugrótinum í Hósmøl vóru so góðar, at hann sá hetta sum sín møguleika at menna seg enn meiri sum listamann. Við nærri eygleiðing sá hann ikki bert tann reyða litin, men eisini tann brúnliga, grønliga og okkurlitin í lindini.

- Her var so nógv at velja í, at eg hevði ilt við at avgera, hvørjar litir eg skuldi taka heim við mær. Ja, satt at siga føldi eg meg sum hermannin í ævintýrinum "Eldførið", tá hann, eftir at hava fylt lummarnar við koparmyntum, kom inn í næsta kamarið fylt við silvurmyntum!

Eli byrjaði so í smáum at mjølva grótið, og gjørdi burtur úr hesum bæði oljulitir og akrýllitir, sum síðani vórðu brúktir í arbeiði hansara sum listamaður. Hesa tíðina





*Skilligt er at eitt stórt arbeiði liggur aftanfyri hvørja einstaka plátu, skuffu og skáp*



*Mynd: Jens Kristian Vang*

